FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# PEDAGOGAR OG HJÁLPARFÓLK

## TIL DAGSTOVNIN OG STOVNAR HJÁ FUGLAFJARÐAR KOMMUNU

**Søkt verður eftir pedagogum og hjálparfólkum til vøggustovu, barnagarðstovu og stovnar hjá Fuglafjarðar kommunu.**

**Byrjað verður 1. august 2009 ella eftir nærri avtalu.**

Eitt pedagogstarv á 30 t. viku í barnagarðsstovu

Eitt pedagogstarv á 40 t. viku í barnagarðsstovu

Eitt pedagogstarv á 40 t. viku í vøggustovu

Eitt tíðaravmarkað starv 40 t.viku í vøggustovu í tíðarskeiðnum 1.august 2009 til 31.juli 2010

Eitt hjálparfólkastarv 20 t. viku í vøggustovu. Tann, sum settur verður í hettar starv, skal verða sinnaður at arbeiða fleiri tímar í stytri og longri tíðarskeið.

Eitt pedagogstarv á 35 t. viku at arbeiða við sertørvi í stovnum hjá Fuglafjarðar kommunu

Dagstovnurin er skipaður í tvey hús við eini barnagarðstovu og eini vøggustovu í hvørjum húsi.

Frá 01.08.2006 er dagstovnurin ætlaður 76 børnum við tað at stovnurin varð víðkaður við eini barnagarðsstovu.

**Vit sóknast eftir pedagogum og hjálparfólki:**
- í kunna arbeiða sjálvstøðugt, og er førir fyri at orða seg skrivliga
- hevur arbeiðsroyndir, sum kunnu nýtast í dagliga arbeiðinum
- hevur umsorgan fyri børnunum
- er eldhugaður og jaligur
- hevur góð samstarvsevnir
- sær møguleikar fram um mørk

**Vit kunnu bjóða tær:**
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur
- eitt starv, har tú kanst brúka tínar dygdir, hava ávirkan og samstundis menna teg sjálvan
- samstarv við NSR tænastu, náms- og sálarfrøðilig ráðgeving, sosialu deild og stovnar hjá Fuglafjarðar kommunu

**Setanartreytir**
Løn eftir sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðaran í dagstovninum Juliannu Næs á tlf 737780.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu verða Býráðskrivstovuni, Ennivegur 38, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi 23.juni 2009 kl. 10.00

Møguligar setanarsamrøður verða í viku 26

Kommunan skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknir ella onga at taka.

FØROYA PEDAGOG FELAG

# Starvsfólk til Føroya Pedagogfelag

**Høvuðsuppgávur**
- At tak lut í dagliga arbeiðinum í felagnum
- Røkja nýggja journalskipan
- Avgreiða dagligar sáttmála- og lønarspurningar
- Veita limum ráð og vegleiðing
- Allar fyrifallandi uppgávur

**Førleikakrøv**
- Fyrisitingarligar royndir
- Góðan telduførleika
- Kann verða ein fyrimunur, at viðkomandi hevur eftirútbúgving á fyrisitingarliga økinum og kunnleika til lógararbeiði ella hevur arbeitt við lógararbeiði

**Lønar- og setanartreytir**
Løn smb. avtalu – Eisini góðir møguleikar fyri umflokking við tíðini.

**Arbeiðstíð**
Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna – Møguleiki er fyri eitt sindur styttri arbeiðsviku.

**At byrja** 1. sept. 2009 ella eftir nærri avtalu

**Felagið**
Vit eru eitt fakfelag í støðugum vøkstri og hava tí brúk fyri fleiri starvsfólkum.
Arbeiðið er sera spennandi, tá arbeiðsuppgávurnar eru nógvar og fjølbroyttar.
Vit leita tí eftir fólki, ið kann taka hond í við øllum uppgávum í felagnum.
Tú verður partur av einum fyrisitingarligum toymi.
Í starvi ídag eru formaðurin, fyrisitingarleiðari og bókhaldari

**Umsókn skal sendast til:**
Føroya Pedagogfelag
Postsmoga 318
Tlf. 31 75 76
110 Tórshavn

Umsóknin skal verða send felagnum í seinasta lagi 1. juli 2009

Merkið brævbjálvan: »Umsókn«.

# Námsfrøðingar til Dagstovnin í Kvívík

Dagstovnurin í Kvívík søkir eftir 5 námsfrøðingum:

• 4 námsfrøðingum ¾ tíð.
Størvini eru í vøggustovu, barnagarði og frítíðarskúla.

Tey settu í koma at arbeiða í vøggustovu og barnagarið, arbeiða 3 vikur fulla tíð, tann 4. vikan er frívika. Starvið í frítíðarskúlanum er 6 tímar um dagin.

• 1 námsfrøðingini til 40 tímar í vøggustovu.

Størvini eru tøk frá 1. september 2009, ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðstíðirnar eru ímillum kl. 07.00 og 17.30

Dagstovnurin í Kvívík hevur 12 ár á baki og er ein samansettur stovnur, sum heldur til í tveimum ymiskum húsum í Kvívík og einari vøggustovu í Leynum.

**Dentur verður m.a. lagdur á í dagligdegnum:**
- Umsorgan
- Opinleika og rúmsátt
- Sjónlig og týðilig vaksin
- At menna tey skapandi evnini
- Lærandi og mennandi túrar í náttúruni.

Okkara mál við arbeiðinum er, at skapa tryggar og mennandi umstøður fyri børn og vaksin.

Vit ynskja umsøkjarar við námsfrøðiligari útbúgving, royndum, hugi at arbeiða við børnum, hugflogi og løttum sinnalag.

Kvívíkar Kommuna er komin væl áleiðis at byggja nýggjan Dagstovn og kunnu vit tí bjóða tær:

- Ein nýggjan stovn fyrst í komandi árið.
- Møguleikan at byggja ein nýggjan stovn upp.
- Eitt gott arbeiðsumhvørvi bæði inni og úti.
- Møguleikan at seta tín dám á dagligdagin.

**Lønar- og setanartreytir.**
Løn og setanarviðurskifti eru samb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira kann fáast at vita um størvini við at ringja til leiðaran á telef. 772412, ella varaleiðaran á telef. 221552.

Umsóknir við prógvum, viðmælum og CV skulu vera stovninum í hendi innan 30. juni 2009.

**Kvívíkar Kommuna**
**Víkavegur 4**
**FO-340 Kvívík**



**Café & Grill í Skopun**

**søkir nýggjan leigara/eigara**
**Ring og hoyr meira á tlf. 268920**

# SUMMARFRÍ

**Vegna summarfrí í juli mánaða, verða bert átrokandi arbeiði gjørd.**

**Palli á Dul**
Løggildugt el-innleggjaravirki
Tel. 218091 - 211789




**Hesin fitti Opel Kadett B**
**er til til sølu. Er fyrstu ferð skrásettur í august 1973 og er í sera góðum standi. Hevur einans koyrt 54.000 km. Hevur havt tveir eigarar, tann fyrra fyrstu 28 árini. Til sølu fyri 22.000 kr**

**Ringið 216409**